VINNUMÁLARÁÐIÐ

# Tú ynskir tær ein fjølbroyttan gerandisdag

Nú eitt av starvsfólkum okkara fer í annað starv, sóknast Vinnumálaráðið eftir starvsfelaga at byrja 1. januar 2007 ella skjótast til ber eftir hetta. Talan er um eitt skrivarastarv á Ráðsskrivstovuni, har ið tú umframt vanligu arbeiðsuppgávurnar sjálv/ur kemur at verða við til at skapa arbeiðsdagin. Starvið kann til tíðir verða strævið, men samstundis sera áhugavert og mennandi.

**Av vanligu arbeiðsuppgávunum kunnu t.d. nevnast:**
- Skrivari hjá leiðslu og landsstýrismanni
- Dagføringar av heimasíðuni hjá stjórnarráðnum
- Rættlestur á føroyskum máli
- Journal og postavgreiðsla

Vinnumálaráðið er umsitingin hjá landsstýrismanninum í vinnumálum. Ráðsskrivstovan er ein deild við fjølbroyttum og samskipandi arbeiðsuppgávum, ið stendur á odda fyri stjórnarráðnum. Fjøltáttaðar og áhugaverdar uppgávur, ið koma at seta sín dám á framtíð Føroya, liggja fyri framman, og hetta verður tú saman við Vinnumálaráðnum ein partur av.

**Vit hugsa okkum, at tú:**
- hevur skrivstovuútbúgving ella aðra hóskandi útbúgving
- hevur góð samstarvsevni
- klárar at arbeiða við fleiri uppgávum ísenn
- megnar at arbeiða undir stórum arbeiðstrýsti
- hevur hollan kunnleika til føroyskt umframt danskt og enskt
- dugir at nýta vanlig KT-forrit

Tú fært meiri at vita um starvið, um tú vendir tær til Arna Poulsen á tlf. 35 60 70

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og hini stjórnarráðini.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu saman við prógvum, CV og møguligum viðmælum sendast til:

**Vinnumálaráðið**
Postrúm 377
Tórshavn

Umsóknin skal verða Vinnumálaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 30. oktober 2006.

VINNUMÁLARÁÐIÐ

# Tú hevur áræði og hug til at vera við til at skapa framtíð Føroya

Nú eitt av okkara starvsfólkum er farið í annað starv, sóknast Menningardeildin í Vinnumálaráðnum eftir einum nýggjum starvsfelaga at byrja 1. desember 2006 ella skjótast til ber eftir hetta. Talan er um eitt fulltrúastarv, har ið tú umframt vanligu arbeiðsuppgávurnar kemur at luttaka í og fáa ábyrgd av størri verkætlanum. Av verkætlanum, sum arbeitt verður við á deildini í løtuni, kunnu t.d. nevnast:

- at einskilja fyritøkur landsins
- at betra um møguleikarnar at ferðast loftvegis. Dagføra floghavnina og skapa gróðrarbotn undir økta kapping á Føroyaleiðini
- at styrkja vinnuframaátøk og íverkasetan, herundir at leggja Menningarstovuna og Ferðaráð Føroya saman í ein dynamiskan vinnuframastovn
- at dagføra vinnulóggávuna soleiðis, at hon fylgir altjóða standardum
- leggja framtíðarætlanir fyri økið

Vinnumálaráðið er umsitingin hjá landsstýrismanninum í vinnumálum. Menningardeildin er ein dynamisk deild, hvørs umsiting fevnir breitt um fleiri áhugaverd øki, og har fjøltáttaðar og vaksandi uppgávur standa fyri framman. Deildin fæst við almenna vinnumenning, herundir vinnuframamál, ársroknskaparmál, partafelagsmál, grannskoðanarmál, fjarskiftismál, KT-vinnu, postmál, kappingarmál, vega- , og havnamál, og ferðslu-, og flogferðslumál.

**Vit hugsa okkum, at tú:**
- hevur útbúgving frá hægri lærustovni, t.d. sum búskapar- ella løgfrøðingur.
- ert dynamisk/ur og kreativ/ur
- hevur góð samstarvsevni
- hevur góð evni at hava fleiri bóltar í luftini ísenn
- megnar at arbeiða undir stórum arbeiðstrýsti
- hevur hollan kunnleika til danskt og enskt, umframt føroyskt
- dugir at nýta vanlig KT-forrit

Meiri fæst at vita um starvið um tú vendir tær til Arna Poulsen, aðalstjóra á tlf. 35 60 70 ella Niels Winther, deildarstjóra á tlf. 35 60 76

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og hini stjórnarráðini.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu saman við prógvum, CV og møguligum viðmælum sendast til:

**Vinnumálaráðið**
Postrúm 377
110 Tórshavn

Umsóknin skal verða Vinnumálaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 30. oktober 2006.

Sosialurin
www.sosialurin.fo